# Vit hava bara lovað tað, sum vit megna at halda

*–Eg eri avbera fegin um, at vit hava fingið álit aftur ímillum Landsstýrið og Lærarafelagið. Tað skuldi forða fyri, at slíkar ósemjur taka seg uppaftur, sigur Høgni Hoydal*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað, sum hevur ein tann størsta týdningin er, at vit hava ikki lovað nakað, sum vit ikki kunnu halda.

Høgni Hoydal, Landsstýrismaður í undirvísingarmálum er sera fegin um, at tað eydnaðist at fáa semju í lag við Lærarafelagið sunnukvøldið.

Men hann er minst líka fegin um, at hann heldur, at tað hevur eydnast at endurvinna eitt álit ímillum Lærarafelagið og landsstýrið.



*Høgni Hoydal og Elsa Birgitta Petersen skriva undir nýggjan sáttmála seint sunnukvøldið. Ósemjan ímillum partarnar er ikki so stór, heldur Høgni Hoydal*

Høgni Hoydal sigur, at tað, sum gjørdi, at tað kom glið aftur á samráðingarnar var, at nevndin í Lærarafelagnum kundi vátta, at hon kundi seta sína bindandi undirskrift á ein sáttmála.

Hann sigur, at tann nýggja semjan byggir í høvuðsheitum á semingsuppskotið, sum varð vrakað á páskum, við ymsum broytingum.

–Tað, sum var tað tyngsta málið, var spurningurin um arbeiðstíðina.

– Hetta er eitt mál, sum vit máttu hava semju um nú, tí tað hevur ligið óloyst so leingi.

– Men nú skulu vit seta okkum saman at gera eitt uppskot um arbeiðstíð, sum skal roynast í verki í eini skiftistíð, áðrenn tað verður sett í gildi.

Harumframt eru nakrir niðurskurðir komnir afturat.

Høgni Hoydal metir tað eisini at hava sera stóran týdning, at hann hevur tryggjað lærarunum, at nú skal tann nýggja fólkaskúlalógin gjøgnumlýsast, men at onki verður sett í verk fyrrenn semja er fingin um, hvattað kevur.

– Tað haldi eg fekk veruligt glið á samráðingarnar, sigur hann.

Men sostatt hevur Høgni Hoydal eisini fingið viðhald í einum av sínum høvuðskrøvum, nevniliga, at spurningurin um nýggju fólkaskúlalógina skal ikki tengjast uppí sjálvar sáttmálasamraðingarnar.

– Nú er greitt, at tað er fíggjarmálastýrið, sum skal samráðast um lønarviðurskiftini, men at Undirvísingar og Mentamálastýrið skal samráðast um undirvísingarmál og onnur viðurskiftin.

Men sjálvandi kunnu broytingar eisini føra við sær broytingar í lønarviðurskiftunum.

### ikki lovað ov nógv

Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum sigur, at tað, sum hevur størstan týdning, er, at hvørki hann, ella Karsten Hansen, hava lovað nakað, sum teir ikki megna at halda.

– Vit hava ikki lovað, at at seta meiri pening av til skúlan, ella at leggja eykajáttanir fyri tingið.

– Vit lova bara tað, sum vit kunnu halda.

– Tað er tað týdningarmesta, um tað skal eydnast at skapa álit aftur ímillum Lærarafelagið og Lansstýrið.

Høgni Hoydal heldur, at tað er av størsta týdningi, at mál verða loyst í sátt og semju, heldur enn við verkføllum.

– Men skal tað eydnast, má álit verða ímillum partarnar. Og skal álit verða ímillum partarnar, so skal samskifti vera.

– Og eg eri avbera fegin um, at vit nú hava fingið hetta samskifti í lag við Lærarafelagið, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at skal tað eydnast at fáa fólkaskúlalógina at virka, at er ta neyðugt at samskifta við tey, sum skulu arbeiða undir lógini.

Hann hevur tí fult álit á, at nevndararbeiðið, sum nú skal gerast, fer at føra til eitt gott úrslit.

Hann heldur ikki, at ósemjan er so stór ímillum partarnar m.a. um arbeiðstíðina.

– Men hetta er ókunnugt fyri lærararnar, tí teir vita ikki, og teir skulu eisini hava tíð at laga seg til eina nýggja skipan, hana, sigur Høgni Hoydal.




**RICHARD RAGNVALD**
**á Hotel Föroyum**

Leygarkvøldið 13/5

Til Matna

- **Laksapaté** við salati og heimabakaðum breyði
- **Heilstoktur lambsryggur** við grønmeti, Bordlaise sós og Pom a la Creme
- **Sjokolátuyvirtrekt ístrifla** við berjamorli og róma

RICHARD RAGNVALD undirheldur undir borðhaldinum og INJOYERS spæla til dans

Sosialurin - 311820



Kostnaður fyri tiltakið kr. 295,-
Bílegging á tel. 31 75 00

Forsølan av atgongumerkjum er byrjað

**Eisini fæst bílig gisting**

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar Best Western
Tel. 317500




# Landbúnaðurin skal eisini vera mentanarberari

ÓLAVUR Í BEITI

– Landbúnaðurin eigur - sum vinnugrein - at vera fjøltáttaður, burðardyggur og so vítt gjørligt kappingarførur. Landbúnaðurin skal eisini vera mentanarberari og elva til livandi útoyggjar og varðveitslu av náttúruni, og lagast til krøv brúkarans um matdygd og -tryggleika, umhvørvisvernd, djóraheilsu og vælferðina hjá húsdjórum.

– Við atliti at hesi fjøltáttan skulu setast í verk greiðari fyrisitingarligar mannagongdir, herundir vinnufremjandi tiltøk, ið hava til endamáls at menna landbúnaðarvinnuna. Tað vil siga, at vinnuliga nýtslan, t.e framleiðslan av landbúnaðarvørum, í størri mun skal verða lagað eftir marknaðinum. Í teoriini hendir hetta skjótt og liðiliga, tí hvør einstakur er eggjaður til at síggja til, at teir faktorarnir, viðkomandi ræður yvir, kasta sum mest av sær. Havast skal tó í huga, at marknaðarskipanin ikki í sær sjálvari syrgir fyri øðrum, enn at ynski brúkaranna í stóran mun verða fylgd, sigur Finnbogi Arge.

Og sagt verður eisini í tilmælinum hjá landbúnaðarmálaráðharranum, at ætlanin er tí ikki dag frá degi at avtaka verandi landbúnaðarstudningar, men heldur at endurskoða galdandi skipan, við atliti til at menna vinnuna. Her verður serliga hugsað um ráðgeving, royndarvirksemi og stuðul til verkætlanir t.d. innan framleiðslu av vistfrøðiligum landbúnaðarvørum o.ø. At nýta tey amboð, sum eru tøk í galdandi lóggávu, at tryggja búsetingarmynstrið í útoyggjum, her verður hugsað um bústaðarskyldu festarans, og at skapa møguleikar fyri, at aðrar vinnur kunnu ganga saman við landbúnaðinum.

– At landbúnaðurin í størri mun fær strategiskan týdning sum eitt slag av tilbúgving í krepputíðum, tá tørvur er á at hava framleiðsluorkuna í landinum, og verður málsetningurin í hesum sambandi tí at økja um framleiðsluna av fóðri og minka samsvarandi um innflutningin. Málsetningurin fyri framtíðina hjá landbúnaðinum verður at eggja til, at vinnan kann verða sjálvberandi og sum frálíður skapa avkast. Hetta er fyrsta fortreytin fyri, at vinnan kann gerast búskaparliga stabil.

– Skal landbúnaðarvinnan skapa framburð í samfelagnum, má hon vera innovativ, hava dagførda vitan og fjøltáttað samskifti. Samstundis má hon liva upp til tey krøv, samfelagið setir henni og - við virðing fyri settum stevnumiðum - skal landbúnaðarvinnan, so vítt gjørligt sjálv skipa fyri sínum viðurskiftum, sigur Finnbogi Arge.

# Føroysku genturnar úr at gera í New York

*Gissur Patursson hevur sent okkum hesar ferðafrásagnirnar frá túrinum hjá føroysku modellunum í New York*

**Langi fríggjadagur 21.04.00**

Ja so komu vit loksins í gjár úr Íslandi til New York – alt ferðalagið var nokk so útlúgvað, men eisini var hópurin sera spentur til alt tað nýggja og stóra, ið eyðkennir USA. Men longu tá ið vit skuldu gjøgnum »Checkpoint Charlie« (pass kontrol) høvdu vit eitt sindur av trupulleikum orsakað av, at onkur av tollarunum ikki vildi góðtaka, at vit vóru føroyingar – men vildi hava okkum at vera danir. Eftir eina løtu loysti trupulleikin seg so – haldi sjálvur, at tollarinir vóru í so óblíðir – men eftir gjøllari umhugsni – so er talan um, at her hendir sera nógv óhugnaligt – teir spyrja eisini, hvat fyri slag av privatum ørindum tú hevur, tá ið tú vitjar land teirra eins og fleiri aðrar heldur løgnar spurningar.

Um kl. 21 komu vit so við bussi til hotel okkara The Waldorf Aspen, ið liggur á Park Avenu 301 í Manhattan (havi sjálvur ikki sæð so stórt hotel fyrr), bara tað, at tað eru 27 elevatorar, og tað eru 42 hæddir,1250 kømur + 150 suitir, fitnes sentur/hárfríðkan/nógvir handlar, og øll »service« er sjálvandi møguliga allar 24 tímar, ið er rættuliga vanligt her.

Tað at páskir eru, leggur tú ikki til merkis, her er alt opið sum vanligt.

Eitt sermerkt er at leggja til merkis: »Non smoking« hevur rættuliga gjørt vart við seg – tað er ringt at finna eina kaffibar ella matstað, har tað er loyvt at roykja, og í summum støðum er bert loyvt at roykja eftir kl. 13.00.

Í dag hava modellirnar so vant síðani kl. 10.00 til kl. 15.00 – eisini hevur ein kendur fotografur verið og tikið myndir av teimum, ið vit so sleppa at síggja seinni í dag. Fotografurin eitur Ismanz.

Kl. 15 í dag er bólkurin so sloppin leysur her í Manhattan til kl. 18 – so nú verða allir handlar í nánd vitjaðir. Skal viðganga, at tað er gott at hava gott tol. Tá allar »diddurnar« skulu passa klæðir ella kanna ymisk luktilsi – tann eini sermerkti kvinnuhandilin tætt við okkum er á 7. hædd, og fann eg útav, at bert 1/4 av tí hæddini bleiv nýttur til mannfólk. Kl. 18 skal so hópurin út á eitt etistað fyri sera ung fólk. Annars má eg siga, at tann føroyski bólkurin er ógvuliga harmoniskur og væl skrúvaður saman – júst sum eitt gott væltrenað hondbóltslið – tær hjálpa hvørjari aðrari og eru sera góðar at styðja hvørja aðra í teim ymisku greinunum, tær skulu arbeiða við.

Ein bólkur, sum foreldur kunnu vera stolt av, og sum uppførir seg sera væl, sjálvt um programmið hjá teimum er strævið.

# Bill Clinton og tær føroysku modellirnar á sama hotelli í New York

**25.04.00**

Í gjár var aftur ein hektiskur dagur hjá »modellunum«, tær eru til ymiskar kappingar, og nógvir dómarar vóru og hugdu at teimum í teim ymisku kappingunum. Millum annað vóru dómarar frá Cosby (instruktørurin) + instruktørurin í Home Alone II og ein, ið hevði arbeitt við øllum filmunum hjá Sylvester Stallone – og meðan kappingarnar fóru fram varð alt hotellið kannað fyri tryggleika – vaktarmenn komu inn atkanna øll rúm, har vit búgva, og sjálvandi ikki uttan grund, tí at Bill Clinton skuldi gista her í tveir dagar - á ovastu hædd er ein president »suita«.

Tær føroysku modellirnar ætla at fáa hann á tal, um hvat hann heldur um loysingina – men í skrivandi stund er tað ikki eydnast.

Í dag (fríggjadagin) hevur verið rættuligt rok í, allar (modellirnar) vóru bidnar at koma til samtalu hjá teim 63 modelbureaunum, ið hava fylgt við kappingunum allar dagarnar, og tað varð ikki smávegis av samrøðum + fotografering tær skuldu til. Tær skuldu m. a. hitta:

Boss models
Elite models
Diva models
Ford models
World models
Y'DR models
Del Marco models
New York models
Flash models

Kappingin her er hørð, so lagið er sjálvandi gott hjá teimum, ið skuldu til nógvar samrøður og kanska ikki so gott hjá teimum, ið høvdu fáar. Men hetta hava tær fingið at vita hvønn dag:

»You have to loose or to win« sum tey siga her, men framvegis so er væl skrúvað saman, so ferðaliðið er klárt til at taka »ups and downs« sjálvt um eg má ásanna, at »diddunum« eisini leingist heim eftir sjeikum/foreldrum og vinfólkum, skuldi eg heilsa frá bólkinum.


**Skrivstovustarv**

**Skrivstovustarv M/K**

Eitt av starvsfólkum okkara fer undir aðra útbúgving, og tí verður søkt eftir einum fólki til Teknisku Avgreiðslu.

Á Teknisku Avgreiðslu arbeiða í løtuni 5 fólk og saman við Teknistovuni myndar Teknisk Avgreiðsla eina deild upp á 14 starvsfólk. Arbeiðsstaðið er á Hálsi í Havn.

Tann ið settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving og hava áhuga fyri føroyskari rættskriving og gjarna kunnleika til enskt.
Royndir innan arbeiði við teldu er ein fyrimunur.

Teknisk Avgreiðsla hevur nógv samskifti við samstarvsfelagar á Føroya Tele og við viðskiftafólk úr øllum Føroyum. Hetta samskiftið er sum oftast um telefonina ella um teldupostin.

**Arbeiðið umfatar viðgerð av umsóknum til:**
- Fastnet og fartelefonir
- Telefontænastur
- Útgerð (vekslarar, mynttelefonir, korttelefonir, terminalar o.a.)

**Uppgávur hjá Teknisku Avgreiðslu eru m.a.:**
- At skráseta og viðgera umsóknir av ymsum slag á EDV.
- At veita kundum og umsøkjarum vegleiðing.
- At skráseta tekniskar upplýsingar á EDV.
- At skráseta dáta til telefonbók á EDV.

Eitt sera spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum.

Starvið er lønt sambart sáttmála við avvarandi yrkisfelag og Føroya Tele. Starvið ynskist sett sum skjótast.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Valborg Hjaltalin Jensen ella Kára Dal-Christiansen á telefon 30 30 30.

Umsóknir skulu verða inni í seinasta lagi 16.05.2000 og sendast til:

Føroya Tele
Stravsfólkadeildina
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355